Starvslýsing

Heimatænastan

## Feriuavloysarir til Heimatænastuna Vágar/Norðstreymoy

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum at arbeiða sum feriuavloysarir frá 15. juni 2009 til 15. september 2009 úti hjá brúkarunum í Heimatænastuni øki 2 og inni á eldarsambýlunum á hesum støðum:

- Sundalagið/Eiði
- Vestmanna/Kvívík
- Vágar
- Eldrasambýlið í Vestmanna
- Korndalsbýlið á Eiði

Um tú kanst arbeiða í stytri tíðarskeiði, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisskrivstovuna tlf. 333249.

**Setanartreytir**
Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Økisskrivstovan, Hornavegur 12
370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 3. apríl 2009**

**Les meira á www.naerverk.fo**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



Starvslýsing

Heimatænastan

## Deildarleiðari til Heimatænastuna í Vestmanna

Søkt verður eftir deildarleiðara til Heimatænastuna í Vestmanna at byrja 1. apríl 2009 ella skjótast tilber at arbeiða í starvsbrøki 0,8.

Uppgávan hjá deildarleiðaranum er at hava dagligu leiðsluna inni á Eldrasambýlinum í Vestmanna og úti í økinum í Heimatænastuni

**Ábyrgdarøki**
- Tryggja dygd og samanhang í røktini og tænastuni
- Gera arbeiðsætlan til starvsfólkini
- Vegleiða og stuðla starvsfólkinum
- Móttøka av nýggjum búfólkum
- Virka fyri, at avvarðandi og onnur vitjandi til eina og hvørja tíð kenna seg vælkomnan í heimið
- Jaligt samskifti við aðrar stovnar
- Samskipa tænastuni inni og úti

**Førleiki**
- Heilsufaklig útbúgving
- Hug og hegni at fyrisita og leiða
- Evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi starv, har tú hevur møguleika at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evnir
- Eitt gott umhvørvi, har hvør einstakur kennir seg væl

**Setanartreytir**
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni Heimatænastan. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 762201

**Umsókn**
Sendið eina umsókn við avriti av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Økisskrivstovan, Hornaveg 12
370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 27.03.2009 kl. 15.00.**

**Les meira á www.naerverk.fo**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



Javnstøðunevndin

# Tiltak um páparættindi

Javnstøðunevndin skipar fyri tiltaki um páparættindi.

Endamálið við tiltakinum er at økja um kunnleikan til páparættindi í føroyska samfelagnum og til, hvussu støðan hjá pápum í Føroyum er í mun til børnini, tá ið pápin og mamman ikki búgva saman.

**TILTAKIÐ VERÐUR SOLEIÐIS:**

**Mánakvøldið 16. mars klokkan 19.30 í Miðlahúsinum í Tórshavn.**

**Týskvøldið 17. mars klokkan 19.30 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.**

**TEY, IÐ LEGGJA FRAM, ERU:**

**Jørgen Lorentzen:** Leikluturin sum pápi og rættindi hjá pápum í søguligum og nútíðar høpi. Jørgen Lorentzen er senior-granskari við Lærda háskúlan í Oslo.

**Lene Moyell Johansen:** Foreldramyndugleiki og samvera.

Lene Moyell Johansen er løgfrøðingur og fulltrúi hjá Ríkisumboðnum.

Orðstýrari er Solby Eliasen, journalistur.

Høvi verður eisini at seta spurningar til panel-luttakararnar og til at skifta orð um páparættindi.

Tiltakið er ókeypis og alment.

Javnstøðunevndin | Box 366 | 110 Tórshavn
Tlf. 212848 | javnratt@javnratt.fo | www.javnratt.fo



## DEKKARI
*til Magnus Heinason*

Søkt verður eftir dekkara til Magnus Heinason at byrja í apríl 2009.

Tann, ið settur verður, skal hava heilsuváttan fyri sjófólk. Umframt skal hann hava góð samstarvsevni og vera røkin. Tað er ein fyrimunur at hava góðan kunnleika til trolreiðskap.

Lønar- og setanartreytir eru sbrt. sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Erling í Liða, reiðara (tlf. 35 39 00, e-post: erlingl@frs.fo).

Umsóknarfreistin er mánadagin 16. mars 2009.

Skrivligar umsóknir við viðmælum ella líknandi skulu sendast Fiskirannsóknarstovuni.

Merkið brævbjálvan „Dekkari“.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fiskirannsóknarstovan
Postrúm 3051, Nóatún
110 Tórshavn, Føroyar

Tel. +298 35 39 00
Fax +298 35 39 01